# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2024

## 07.08.2024-07-24

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 07**<br>Tíð: **07. August. 2024, kl. 19:30**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis: |
| <u>Fastir fundardagar:</u> | <u>Møtt:</u> |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 01/07-24**<br>• **Fyrispurningur um bátadrátt við upp hálingarvogni á.** | • **Tað eru tveir dráttir í Lopra, hesir muga fyrst setast í fullgóðan stand, og so kann møguliga annar av hesum brúkast. Hendan umsókn má kannast nógv betur hvat viðvíkir kostnaði.** |
| **Mál nr. 02/07-24**<br>• **Umsókn um keyp av matr. nr. 122f í Sumba.** | • **Samtykt at selja umsøkjaranum matrikul nr. 122f. Matrikul nr. 122f kann ikki seljast víðari uttan um Sumbiar kommunu, og byggjast skal innan 2 ár frá yvirtøku degi.** |
| **Mál nr. 03/07-24**<br>• **Støðutakan til verandi loysn um dagrøktarhús.** | • **Loysnin á krossinum og samkomuhúsið niðara hædd eystur eftir blivu viðgjørdar. Bygdarráðið er ikki samt um hvat er besta loysnin, og áðrenn bygdaráðið tekur avgerð, ynskist eitt prát við leiðaran/starvsfólkið í dagrøktini. Fáa Bergur at gera fleiri fullfíggjaðar tekningar uppá baði húsini.** |
| **Mál nr. 04/07-24**<br>• **Umsókn um stuðul til námsferð.** | • **Samtykt at stuðla við 1.000kr/næming, 3.000kr tilsamans.** |
| **Mál nr. 05/07-24**<br>• **Tilboð uppá I-mop til skúlan og samkomuhúsið.** | • **Samtykt at keypa eina I-mop fyri 24.950 kr + MVG, og so eina frá Elding til samkomuhúsið at prøva.** |
| **Mál nr 06/07-24**<br>• **Umsókn til byggiloyvi - Í Kerinum 36** | • **Samtykt at geva loyvið til hesa umvæling sambart innsendu skjølum, øll onnur loyvir muga eisini verða í ordan, so sum grannaloyvið og byggjast skal eftir BK17.** |
| **Mál nr. 07/07-24**<br>• **Uppskot til løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgarunum.** | • **Taka eina avgerð saman við Hov, Porkeri og Vági.** |
| **Mál nr. 08/07-24**<br>• **Umsókn um byggiloyvið til víðkan av altani à Bøgøtu 23.** | • **Samtykt at geva loyvi til hesa víðkan av altani eftir innsendnum tegningum. ET var ikki við í hesi viðgerð.** |
| **Mál nr. 09/07-24**<br>• **Umsókn frá Sumbiar dansifelag.** | • **Samtykt at játta ein stuðul til keyp av takið.** |
| **Mál nr. 10/07-24**<br>• **Umsókn um stuðul frá TB flogbóltur.** | • **Samtykt ikki at stuðla.** |

SUMBIAR KOMMUNA

| | |
|---|---|
| **Til støðutakan, ella lukkaðan fund.**<br><br>**1. Skattainntøkurnar.**<br>**2. Kanna tørvin á reingerðis hjálp til "eldru"**<br>**3. Tekning til kaffi skúr.**<br>**4. Uppskot um at brúka part av niðari hæddini í samkomuhúsinum til venjingarhøli, um dagrøktin verður verandi á krossinum.**<br>**5. Uppskot um starvslýsing.** | **1. Kunna var um hesar inntøkur, sum eru 0,5% meiri enn somu tíð 2023.**<br>**2. Samtykt at kanna hendan møguleika til 2025 Fíggjarætlan.**<br>**3. Samtykt at geva loyvið til hendan kaffi skúr, tó treyta av at hesin verður kladdur við timbri/plastik og setast gott fastur ein sokkul.**<br>**4. Tikið av skráð.**<br>**5. Ger anakrar tillaðingar áðrenn umsóknin verður send út.** |

Fundurin lokin kl. 22:15

Eyðbjørn Thomsen    Halltóra Joensen    Frits Poulson

Niclas Hentze    Jacoba Ì Homrum

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA